


*Súsanna Skaale, sálarfrøðingur, er millum annað kend frá útvarpssendingini Zip í útvarpinum*

verið upptikin av; at finna sær ein maka, og at finna útav hvørji tey eru, og hvat tey vilja við sínum lívi. Kenslurnar er øgiliga sterkar.

Nakað, sum er øðrvísi enn fyri kanska tíggju árum síðani, er, at ung í dag eru meira upplýst. Tað er tó ikki treytalest betri fyri tey. Tey eru vitandi um eitt nú etingarólag og finna sær skjótari hjálp. Hinvegin kann tilveran orsakað av øktu upplýsingini og fleiri valmøguleikum gerast til eitt prosjekt, sum skal eydnast. Ung kunnu av tí sama seta størri krøv til sín sjálvan og teirra lív. Á tann hátt kann økta upplýsingin skapa nakað av órógv fyri ung.

Tá tað snýr seg um børn og ung, so er ungi sálarfrøðingurin sannførd um, at tað liggur nógv á láni í Føroyum.

– Tørvurin er stórur, og tað er so týðningarmikið at ung kunnu fáa hjálp beinanvegin. Terapi er broyting og ung fólk eru longu í einari broytingarprosess, og tískil handlar tað um at skumpa broytingina tann rætta vegin.

## Fyri øll

Viðtala hjá sálarfrøðingi er ikki ókeypis. Ein tími kostar omanfyri sekshundrað krónur. Tað kann vera ymiskt, hvussu nógv hetta tykist fyri fólk. Tey vitjandi á kontórinum hjá Súsannu, rópar hon eisini fyri kundar.

Eg hava valt at kalla fólkini, eg fáast við, fyri kundar. Orsøkin til hetta er at fremsta uppgávan hjá einum sálarfrøðingi er at síggja persónin aftanfyri sjúkuna ella trupulleikan, og tískil er tað ikki sjúklingar, men kundar.

Tað kann vera rættiliga ymiskt, hvussu stórur tørvurin er hjá tí einstaka. Okkurt er heilt skjótt at avgreiða, men er talan um álvarsligar trupulleikar, so verður viðgerðin sjálvandi tað longri.

Súsanna sjálv heldur tó ikki, at tað er dýrt at leita sær hjálp og vegleiðing hjá einum sálarfrøðingi.

– Vit mugu hugsa um, at tað kostar samfelagnum nógvan pening í heilivági, tá trupulleikarnar skulu loysast á hendan hátt. Gransking vísir greitt, at viðgerð kann minka munandi um tørvin á heilivági t.d. eitt nú tá tað handlar um tunglyndi. Tískil er tað týðningarmikið aftrat heilivági at søkja sær sálarfrøðiliga viðgerð fyri ávísir trupulleikar.

Viðgerðin hjá Súsonnu hevur støði í støðuni hjá tí einstaka. Hon arbeiðir fyrst og fremst við viðtalu. Alt eftir tørvinum hjá tí einstaka verður ein viðgerðagongd løgd til rættis. Tað er upp til kundan sjálvan at gera av, hvørt hann ella hon ynskir at fylgja teirri viðmæltu gongdini. Øll kunnu venda sær til ein sálarfrøðing, og tað er í allarflestu førum eisini ein haldgóð orsøk til, at fólk seta seg í samband við sálarfrøðing.

### FAKTA

Súsanna Skaale er 31 ár. Hon er fødd og uppvaksin í Havn og hevur ferðast eitt sindur úti í heimi. Súsanna gjørdist liðug við sálarfrøðilesnaðin í oktober 2006. Tveir mánaðir seinni byrjaði hon at arbeiða sum privatpraktiserandi sálarfrøðingur. Hon hevur smá børn, og tað merkir, at arbeiðsvikan er stytt til tveir dagar. Umframt at virka í privatari praksis fæst hon eisini við uppgávur fyri barnaverndirnar kring landið.

Sum privatvirkandi sálarfrøðingur fæst tú við menniskju, sum hava tørv á sálarfrøðiligari hjálp í sambandi við eitt nú angist, etingarólag, sorg, strongd, tunglyndi og mong onnur evni.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu langar viðgerðirnar eru. Øll kunnu seta seg í samband við privatpraktiserandi sálarfrøðingar. Saman við sálarfrøðinginum verður síðani avrátt, hvønn tørv tann einstaki hevur á viðgerð. Fólk, ið verða ávíst av kommunulækna, kunnu fáa ískoyti frá sjúkrakassa. Onnur verða noydd at rinda sjálvi.